# Sign á G!

Lovorðini og gleðin hjá G! Festivalinum eru stór nú G! Festival kunnger at ein av fremstu og mest lovandi bólkunum í Íslandi, Sign verður á G!-skránni í summar!

Sambært t.d. størsta rokkblaðnum í Onglandi, Kerrang, so er skilagott at halda eyguni við Sign, sum eru væl á veg at gerast limir í eksklusiva klubbanum, av íslendskum tónleikabólkum, sum sláa ígjøgnum á altjóða tónleikapallinum. Kerrang hevði fyri eini tveimum vikum síðani eina heila síðu við grein um bólkin, ið heitti á lesaran at fylgja væl við Sign.

Fløgan “Thank God for silence” við staklagnum “A little bit”, sum New York framleiðarin Mark Plati hevur framleitt, og sum gittarhetjan, Earl Slick, gestar á, er júst givin út í Onglandi og á alnetinum. Hon fór beinleiðis inn á toppin á íslendska sølulistanum. Men eisini umheimurin byrjar at fáa eyga á íslendska undrið. Tónleikurin kann lýsast sum stórur, orkumikil og melodiøsur. Hann hevur sterkar røtur í arena rokkinum í 80’unum. Men hóast eitt ávíst mát av nostalgi, er Sign bæði nútímans og viðkomandi. Og fram um alt er bólkurin ótrúligur á konsertum. Sign gevur seg 110% og blæsur bæði fólk og fæ um koll. Jantelógin finst ikki á sama hátt í Íslandi, sum vit kenna hana her, og hetta er kanska grundin til, at íslendarar ferð eftir ferð taka heimin av bóli, ikki minst innan tónleikin, skrivar G! festivalurin millum annað.






















## Hevur tú tryggjað børnini?

Øll tryggja sær húsini. Bilurin má tryggjast. Og báturin... Men hvussu er við børnunum? Eru tíni børn tryggjað?

Ein barnavanlukkutrygging fevnir um likamsskaðar á tíni børn, elvdir av vanlukku. At barnið fær varandi mein er ein sorgarleikur í sær sjálvum, men harafturat kann tað verða ein fíggjarligur smeitur fyri familjuna. Hesum tryggjar vanlukkutryggingin ímóti.

Vit bjóða nú øllum børnum undir 18 ár ókeypis vanlukkutrygging tað fyrsta árið. Og tey næstu árini kostar hon eina ávísa upphædd um árið, sum er tann sama uttan mun til, hvussu nógv børn tú eigur.

Barnavanlukkutryggingin er galdandi alt samdøgrið. Bæði í heiminum, úti í spæli og í skúla.




Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGID FØROYAR - so ert tú tryggari